# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*21 sept. fingu Heidi Thomsen og Tummas Ryggshamar ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3650 gr.*

12. september fingu Monika og John Allan Midjord, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 53 cm og vigaði 3650 gr.

16. september fingu Rakul og Michael í Lágabø, Vági, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3650 gr.

20. september fingu Anna Christiansen og Torkil Vilhelmsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3232 gr.

23. september fingu Sára Dam og Johnny Kjærbo, Kvívík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3250 gr.

25. september fingu Torgunn H. Johansen og Egil B. Heinesen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3500 gr.

25. september fingu Eimi Hellisá og Hans Petur Samuelsen, Haldórsvík, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4400 gr.

Sunnudagin 27. september 2009 bleiv Diana stórasystir. Beiggin var 54 cm langur og vigaði 4.000 gr. Foreldurini eru Jana og Johnny Mouritsen í Hvalvík.

27. september fingu Gunnvá og Jóhannus Kjærbo, Strendur, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3900 gr.

28. september fingu Elisa Joen-Jacobsen og Árni Samuelsen, Sandavágur, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4100 gr.

28. september fingu Kari Petersen og Dan Joensen, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3775 gr.

1. oktober fingu Dinna Tindalíð og Eyðun Jacobsen, Nes, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3750 gr.

## Dagurin

2. oktober. Ditlev. Komin upp í halgramannatal í 1725. Ókent halgimenni. Upprunaliga týskt navn, samansett av orðunum fólk og arvur.

(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)

Sosialurin Sosialurin -har tað hendir

# Heilsan til Bjarna á 85 ára degnum

Sunnudagin 4. oktober rundar Bjarni Dal-Christiansen tey 85 árini.

Bjarni, sum er ættaður úr Havn, vaks upp í gamla miðbýarumhvørvinum í Tórsgøtu. Tað man helst vera sum hýruvognsførara í ein mansaldur, at flestu kenna Bjarna, og tað man ikki vera ov nógv sagt, at Bjarni má roknast at vera ein partur av býarmyndini.

Bjarni er ikki millum teirra, sum ídnastur er at luttaka í alskyns tiltøkum, býurin hevur at bjóða, men trívist best í heimligum umhvørvi, har fólk, sum koma á gátt hjá teimum báðum, Bjarna og Palmu, altíð kenna seg vælkomnan. Altíð blíður og skemtingarsamur hóast hansara stillføra og lítillatna lyndi.

Bjarni hevur altíð vera sera røkin. Tað skal vera ordan í tingunum hjá



Bjarna. Perfektionist í odd og egg, vil onkur siga, og hevur hann avtalað okkurt til ávísa tíð, skal tíðin eisini haldast.

Hóast komin nakað til árs, er hann ikki bangin fyri at royna seg við nýggjastu teldutøkni, og hann fær manga løtu at ganga við telduskíggjan, har hann situr og skypar við vinir og kenningar.

Bjarni hevur altíð orku til, og er ikki bangin fyri, at taka eina hond í at hjálpa øðrum, hóast børn, abbabørn og langabbabørn eru eitt og alt hjá teimum báðum, Palmu og Bjarna.

Hjartaliga tillukku við degnum við ynskjum um alt tað besta, og takk fyri tað, tit bæði eru og hava verið fyri meg og míni.

**ella**

# Kennist nakar við menninar?

Myndin er tikin við Høgaból í Runavík. Vit síggja strandfaraskipið Ruth fara frá landi á Høgabóli ein vetrardag.

Ruth var ein av sonevndu mjólkabátunum hjá Thorshavns Mælkeforsyning og Margarinefabrik.

Ruth varð keyptur úr Noreg í 1905 og sigldi sum strandfaraskip til 1926, tá hann varð skiftur út við tann fyrsta Trónd, sum eisini varð keyptur úr Noreg.

Um onkur veit hvørjir mennirnir á myndini eru, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Álv Danielsen á tel 565783 / 321291.




# MERKISDAGAR

**Prógv**
Lis Johansen, ættað av Strondum, búsitandi í Ebeltoft, er vorðin cand. cur. frá Institut for sygeplejevidenskab frá Århus Universitet.

**Prógv**
Benjamin Jacobsen, ættaður úr Vatnsoyrum, sonur Annu og Tummas Jacobsen, er við Lærda Háskúlan í Davis, Kalifornia, vorðin doktari í jarðfrøði við speciali í kosmo kemi. Um tit vilja í samband við Benjamin er teldupost adr. hansara: bjacobsen@ucdavis.edu ella mobil: 0015304005384.

**65 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 2. okt. fyllir Kitty Gudmundsen, í Vági, 65 ár. Føðingardagurin verður hildin í Billiardhúsinum frá kl. 19. Øll er hjartaliga vælkomin.

**70 ára føðingardagur**
Mikudagin 7. okt. fyllir Hákun Debes, Kollafjørður, 70 ár. Dagurin verður hildin heima mikudagin frá kl. 17.

**80 ár**
Mikudagin 7. oktober Johannes Berg bilasølumaður 80 ár. Føðingardagurin verður hildin á Hotel Føroyum hetta sama kvøldið. Byrjað verður kl.18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 2. okt. fyllir Johan Thomasen, Tvøroyri, 80 ár. Dagurin verður hildin 3. okt., frá kl. 15 í heiminum hjá Elin og John Thomasen, Fornarett 13. í Trongisvági. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Sunnudagin 4. okt. fyllur Gudrun Joensen, Hósvík, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini Harriet, á Fløtugøtu 12, Hósvík, frá kl. 17. Øll eru vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Týsdagin 29. sept. fyllir Magnus Jacobsen úr Norðragøtu, búsitandi í Havn, 90 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 3. okt. saman við familjuni.

**90 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 2. okt. fyllir Johanna Johannesen, Jóhanna í Kinn, Fuglafjørður, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin við køkuborði í Lonini frá kl. 19.30. Øll eru vælkomin.